Yrigisskjal C

LM-088/2020

Annika Petersen

Fra: Andrias Ziska
Sendt: 4. januar 2021 15:22
Til: Kristvør H. Poulsen; Mentamálaráðið; 'anfinnurj@setur.fo'; malrad@malrad.fo; FSS - Føroya Stiftsstjórn; Jógvan Fríðriksson; Theodor Eli Dam Olsen; Durita Tausen; Jógvan Ravnsfjall
Emne: SV: Uppskot til broyting í løgtingslóg um fólkanøvn til hoyringar - freist 16. januar 2021

Umhvørvis- og vinnumálaráðið
Att. Kristvør H. Poulsen, skr.

Boðað verður frá, at Føroya Stifsstjórn hevur tikið uppskotið til eftirtektar.

Vinarliga / Best Regards

Andrias Ziska, fulltrúi
Føroya Stiftsstjórn
: +298 31 19 95 & +298 23 73 21 Fax.: +298 31 58 89

Fra: Kristvør H. Poulsen <Kristvorp@uvmr.fo>
Sendt: 4. januar 2021 14:36
Til: Mentamálaráðið <ummr@ummr.fo>; 'anfinnurj@setur.fo' <anfinnurj@setur.fo>; malrad@malrad.fo; FSS - Føroya Stiftsstjórn <stift@kirkjan.fo>; Jógvan Fríðriksson <jf@kirkjan.fo>; Theodor Eli Dam Olsen <theol@kirkjan.fo>
Emne: Uppskot til broyting í løgtingslóg um fólkanøvn til hoyringar - freist 16. januar 2021

Góðan dagin

Uppskot til broyting í løgtingslóg um fólkanøvn til hoyringar

Umsitingin av navnamálum var í 2014 løgd til Umhvørvisstovuna at sita fyri. Tá ið heimildir soleiðis verða lagdar til ein undirskipaðan stovn, kunnu avgerðir hjá undirskipaða stovninum kærast til landsstýrismannin, hvørs avgerð er endalig innan fyrisitingina. Hetta hevur eitt nú havt við sær, at avgerðir, sum navnanevndin tekur eftir navnalógini, kunnu kærast til Umhvørvisstovuna. Avgerðir hjá Umhvørvisstovuni í hesum somu málum eru ikki endaligar innan fyrisitingina og kunnu kærast viðari til landsstýrismannin.

Fyri at kunna skerja kærurættin fyrisitingarliga krevst beinleiðis heimild í løgtingslógini. Ætlanin er at broyta navnalógina, soleiðis at um landsstýrismaðurin heimilar stovni undir sær at sita fyri heimildum navnalógarinnar, so gerast avgerðir stovnsins endaligar innan fyrisitingina. Í navnalógini í dag er eingin kærufreist. Ætlanin er at seta inn eina kærufreist à 4 vikur.

Landsstýrið hevur eisini fingið áheitanir um at broyta navnalógina, soleiðis at tað gerst møguligt hjá hjúnafeløgum at fáa somu samanseting av millum- og eftirnøvnum. Í dag kann annar hjúnafelagin, við samtykki, fáa ættarnavnið hjá hinum, men tað ber ikki til at hava somu samanseting av millum- og eftirnøvnum.

LM-088/2020

Viðvíkjandi rættinum hjá giftum persónum at fáa somu samanseting av eftirnøvnum kann ein loysn vera, at loyva hjúnafeløgum, við samtykki frá makanum, at taka millum- ella ættarnavnið hjá makanum sum sítt millumnavn.

Viðmerkingar til uppskotið skulu verða Umhvørvis- og vinnumálaráðnum í hendi í seinasta lagi **16. januar 2021.**

Vinarliga

Kristvør H. Poulsen, skr.
Umhvørvis- og vinnumálaráðið